# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# 65 føroyskir skótar til Onglands

**Í sambandi við at í ár eru liðin 100 ár síðan altjóða skótarørslan varð sett á stovn, verður ein risa stór skótastevna hildin stutt uttanfyri London**

SKÓTAR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*



20. juli fer eitt føroyskt skótalið mannað við 65 skótum til Onglands, har teir fara at luttaka á eini risa stórari skótastevnu. Heili 40.000 skótar úr 160 ymiskum londum vera við á stvenuni, sum heldur á í tíggju dagar.

### Ikki bara lega

Legan verður eitt upplivilsi fyri lívið hjá føroysku skótunum.

- Endamálið er at samansjóva fólk og at bara vera partur av alheimspartinum. Í fótbólti hevur tú møguleika at uppliva stórhendingar hvørt ár, men soleiðis er ikki í skótaheiminum. Hetta verður eitt upplivilsi fyri lívið, sigur Jan á Argjaboga, frá Føroya Skótaráð.

Føroyska skótaferðalagið fer úr Føroyum 20. juli, og kemur aftur til Føroya 10. august. Undan leguni fara skótarnir at vitja nakrar enskar skótar, umframt at fara við bussi til Skotlands at búgva hjá nøkrum skótum har. Hetta er tískil lagt upp til meir enn bara eina skótalegu og skótastevnu hjá føroysku skótunum.

Tað er Føroya Skótaráð, ið skipar fyri ferðini.

### Áhugaverd skrá

Á skótastevnuni verður ein sera stórur marknaður av ítrivum. Eisini verður skipað fyri einum tiltaki, ið serliga kemur at gleða ein skóta á hvørjum liði.

Oyggin Brownsea Island er fyrsta oyggin, ið ein skótalegað varð hildin á. Oyggin er í dag friðað av ensku myndugleikunum, men serligt loyvi er fingið til vega, soleiðis at ein skóti frá hvørjum liði sleppur at vera tríggjar dagar á oynni, sum altso verður karmur um eina stytri útgávu av einari skótalegu.

Hjá føroyska skótaliðnum verður tað 16 ára gamli Eik Óladóttir Gullbein úr Havn, ið verður tann hepna at sleppa út á oynna. Møguleikan vann hon sær, tá ið hon vann kappingina um bestu grundgevingina fyri, hví hon vildi sleppa út á søguligu oynna, sum stovnarin av skótarørsluni, Baden Powell, lat hava sína fyrstu legu á.

### Dýrt

Ikki er bíligt at ferðast uttanlanda, og tað er tað sanniliga heldur ikki í hesum føri. Luttøkugjaldið er ásett útfrá bruttotjóðarvinninginum hjá landinum, ið skótaliðið kemur frá. Føroyska skótaliðið skal tískil av við luttøkugjald, ið er í tí dýrara endanum av listanum. Ferðin verður sostatt ein dýr ferð, og higartil hevur gingið heldur striltið at útvega pening.

- Vit hava sett foreldrabólkar at skaffa pening. Ferðaútreiðslurnar eru nógvar, og vit stríðast framvegis við at fáa peningin til vega, sigur Jan á Argjaboga, og vísur á, at stuðul frá fyritøkum hevði verið teimum sera kærkomin.





STARVSLÝSING

## Avloysari fyri laborant á mikrobiologisku kanningarstovuni

FOOD VETERINARY and ENVIRONMENTAL AGENCY

Í sambandi við farloyvi verður søkt eftir laboranti til mikrobiologisku kanningarstovuna á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Arbeiðið sum laborantur fevnir um vanligar mikrobiologiskar kanningar av mati, drekkivatni og øðrum.

**Krøv til útbúgving og kunnleika**
Tú skalt hava lokið prógv sum laborantur. Royndir innan vanligar mikrobiologiskar kanningar, góðskustýring og EDV á brúkarastøði eru ein fyrimunur, men eingin treyt.

Tú skalt hava góð samstarvsevni, vera nærlagdur/nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

**Tíð og setanarviðurskifti**
Starvið er fulla tíð. Setanin byrjar 1. september 2007, ella sum skjótast eftir hetta, og er fyribils til 1. mars 2008.

Lønin verður í 4. lønarflokki sambært sáttmálanum hjá Starvsmannafelagnum. Sí heimasíðuna hjá Lønardeildini: www.lnd.fo.

**Umsóknin**
Umsókn til starvið, við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum, skal verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 27. juli 2007.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Beintu Niclasen, yvirlaborant, inntil 20. juli 2007

**Stovnurin**
Heilsufrøðiliga starvsstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at gera lógarásett eftirlit og starvsstovukanningar innan matvøru-, veteriner- og umhvørvisøkið og at fremja gransking og menning við tilknýti til hesi øki.

Á mikrobiologisku kanningarstovuni eru tilsamans 10 fólk. Kanningarstovan er altjóða góðkend eftir DS/EN ISO/IEC 17025 og er undir eftirliti av DANAK. Sí nærri upplýsingar á www.hfs.fo

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 356 400
Fax +298 356 401
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo


# Laksa- og Sølutorg í Runavík

Aftur í verður skipað fyri árliga Laksa- og Sølutorginum í Runavík, sum Kunningarstovan í Runavík og Runavíkar kommuna skipa fyri. Hetta tiltakið hevur verið afturvendandi í nøkur ár og verið sera væleydnað. Byrjað var viðhesum útitiltaki fyri nøkrum árum síðan, og er hetta einasta tiltak av sínum slag í Føroyum. Tiltakið verður leygardagin 21. juli frá kl. 11.00 til 16.30. Flestu handlarnir í Runavík hava langan leygardag hendan dagin við nógvum góðum tilboðum, og eisini verða nakrir handlar á torginum við ymiskum spennandi úrvali.

Á sølutorginum ver_ur nógv spennandi at vitja allan dagin, bæði fyri børn og vaksin Fyri vaksin verður m.a. ókeypis smakkiroyndir av laksi, og kokkurin verður eisini til staðar at veita góð ráð o.s.fr. Á pallinum verður góður tónleikur at hoyra viðm.a. Stanley Samuelsen. Gyklarin Ásbjørn kemur á vitjan at vísa síni kynstur fyri børnunum.

Sum heild ein sera spennandi og áhugaverdur dagur, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Fólk, ið eru áhugaði í at luttaka við onkrum tiltaki, hava møguleikan at venda sær til kunningarstovuna í Runavík.